## Troyttur av spurningum um pápan

19 ára gamli Mads Laudrup, sum er sonur Michael Laudrup, er troyttur av spurningum um pápa sín. - Eg havi verið samanlíknaður við pápa mín, síðani eg dugdi at ganga, og eg veit, at hvørja ferð onkur journalistur tosar við meg, so kemur ein spurningur um pápa. Heilt erligt, so eri eg troyttur av tí, sigur Mads Laudrup við eitt russiskt blað, sum eisini hevur roynt at spyrja hann um Michael Laudrup.



## Bech heldur høvdið høgt

Tað gongur av skriðuni hjá danska superligafelagnum Esbjerg. Teir liggja aftast í superliguni, og um vikuskiftið tapti liðið til Skive í steypakappingini. - Verri úrslitni eru, meira hava spælararnir brúk fyri einum góðum venjara, og eg haldi meg hava nógv eftir at geva liðnum. Men eg má siga, at eg eri vónbrotin av, at spælararnir bert vísa vilja og mót í tríggjar minuttir í hesum dystinum, sigur Troels Bech við JydskVestkysten.

Kyndil-VB 19-31 (9-15):

# Stórsigur til VB

**Hóast Kyndil í ár hevur eitt hampuliga spennandi lið, so fingu tær veruliga oyruni í maskinuna, tá VB kom á vitjan**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

VB-kvinnurnar hava seinnu árini verið partur av avgjørda føroyska hondbóltsoddinum. Og í mun til undanfarin ár, so tykist hópurin á pappírinum heldur breiðari, enn hann hevur verið, og undir øllum umstøðum varð talan um sera góða byrjan, tá tær spældu í Havn sunnudagin.

Talan gjørdist um ein knúsandi sigur á Kyndli, sum annars tykist hava eitt spennandi lið, har setningurin er at byggja víðari á royndirnar, sum hópurin fekk í fjør. Men í fyrstu royndini drógu tær so púrasta blankt.

VB leyp nevnliga avstað alt fyri eitt, og tá tær fyrst høvdu vunnið seg eini fimm mál framum, var luftin mest sum púrasta tikin úr spenninginum.

Og tað eydnaðist ongan tíð hjá Kyndli at svara aftur. VB hevði fult tamarhald á dystinum, og hóast tær ikki øktu so nógv um leiðsluna seinasta hálva tíman, so góvu tær heldur ikki somikið sum lítlafingur frá sær.



*VB kom flúgvandi frá byrjan, tá tær sunnudagin vunnu tryggan sigur á Kyndli*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### FAKTA um dystin

**VB-Kyndil 19-31 (9-15)**
10 min: 2-7
20 min: 5-12
40 min: 12-22
50 min: 16-25
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Jacklin Durhuus 9(2), Rakul Napoleonsdóttir 2, Barbara Egilstrøð 1, Eydna Apol 1, Ása Apol 1, Annika Poulsen 1, Eyðritt Andreasen 1(1), Linda Johannesen 1, Ronja Mikkelsen 1, Marina Zilko 1
**VB:** Daiva Toumaite 9(4), Gurið Mortensen 7, Lina Andriulyte 6, Bára Mortensen 2, Uni Egilsdóttir 2(2), Rannvá Augustinussen 1, Svava Vestergaard 1, Theresa Joensen 1, Laila Jespersen 1, Miriam Michelsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 3, VB 7
**Útvísingar:** Kyndil 4
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

Tjaldur-Neistin 25-25 (14-18):

# Neistin bjargað í evstu løtu

**Tjaldur hevði sigurin í pottinum, men seinasta minuttin skoraðu Neista-kvinnur trý mál, soleiðis at tær fingu bjargað sær eitt stig**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tjaldur er aftur í bestu kvinnudeildini í hondbólti, og hetta varð markerað við buldri og braki sunnudagin.

Neistin kom á vitjan, og hóast tær bláu vórðu roknaðar sum greiðir favorittar, so var tað so nær við, sum tað kundi vera, at Tjadur hevði bæði stigini eftir, tá dysturin var lokin.

Bara ein minutt undan leikloki mundu tey flestu halda, at sigurin var í pottinum. Neista-kvinnurnar høvdu annars verið mest sum púrasta sørar eftir steðgin, og máltalvan vísti 25-22, tá farið varð undir seinasta minuttin.

Og onkursvegna megnaði Neistin eisini at toga sær trý mál á rað seinasta minuttin. Og so kundu tær í Tjaldri bara iðra seg um tað, sum kundi verið. Ein partur av spælinum er eisini at halda høvdinum kalt, tá mest stendur á, og einki er at ivast í, at tað var júst hetta, sum Tjaldur ikki megnaði.

Men við fleiri nýggjum spælarum á liðnum, er lítið at ivas tí, at Tjaldur veruliga hevur potentialið til at órógva í oddinum. Og spurningurin verður so bara, hvussu langt fram tær kunnu stinga nøsina í dysti við Neistan og VB, sum enn mugu roknast sum fremstu avbjóðararnir til stórfavorittarnar úr Stjørnuni.

Tíverri hevur tað ikki eydnast okkum at fáa fakta'ini frá dystinum.



*Annika Thomsen, sum annars hevur fingið sína hondbóltsuppaling í Neistanum, er ein av nýggju spælarunum hjá Tjaldri*

*Mynd: www.tjaldur.net*

Stjørnan-StÍF 28-18 (13-9):

# Eingin slingur í Stjørnu-valsinum

**Meistararnir komu sær ongan tíð í trupulleikar, tá tær runnu StÍF um koll sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

At Stjørnan aftur í ár er greiður favorittur at vinna FM-heitið í kvinnuhondbólti, eru tey flestu so hampuliga samd um.

At liðið í alt summar hevur fyrireikað seg til Europa-Cup dystir hevur eisini borið við sær, at venjingarstøðan longu nú er heilt har á leið, sum hon eigur at vera, og tað fekk StÍF at kenna rættiliga skjótt sunnudagin.

Fram til miðjan fyrra hálvleik fylgdust liðini so toluliga væl, men tá Stjørnan skifti gear eina løtu, skrædnaði av álvara millum liðini.

Og fyrsta korterið eftir steðgin vórðu tummilskrúvurnar veruliga spentar. Hóast StÍF royndi at draga ferðina nakað niður, so eydnaðist hetta ikki meira enn næstbest, og so kundu lokalu stjørnurnar vinna ein hampuliga tryggan stórsigur í ársins fyrstu heimligu styrkisroynd.

### FAKTA um dystin

**Stjørnan-StÍF 28-18 (13-9)**
10 min: 5-3
20 min: 8-5
40 min: 18-11
50 min: 23-15
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Simona Petersen 7(1), Durita Christophersen 6(1), Maria við Neyst 3, Anna Kristina Samson 3, Diane Møller 3, Durita Ljósstein 2, Bára S. Klakstein 2, Durita Mikkelsen 1, Joan Midjord Djordjevic 1
**StÍF:** Rebekka Justinussen 8, Ninna K. Johansen 3(2), Signhild Petersen 2, Louisa Andreasen 2, Sunfríð Johansen 1, Ásgerð Káradóttir 1, Anna Maria Berthelsen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 3, StÍF 3
**Útvísingar:** Stjørnan 3
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen